ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

24. november 2021
Mál: 21/23466
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-083/2021

Svar uppá § 52a fyrispurning nr. 52-083/2021 frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, markamótskjalið og tænastuna til teirra, ið eru yngri enn 67 ár

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Hvussu langt er komið við at fremja ásetingarnar í Markamótaskjalinum – til gagns fyri borgarar yngri enn 67 ár ?
2. Er ætlanin at fáa kommunurnar at hava ábyrgdina av tænastuni til teirra, ið eru millum 18 og 67 ár ?

Svar:

Til nr. 1 og 2

Tá ið lógin um heimatænastu, eldrarøkt v.m. varð sett í gildi 1. januar 2015, varð heimild fingin at seta eina trímannanevnd, sum skuldi taka avgerðir um handfaring av markamótum í mun til aðra lóggávu, Markamótsnevndin. Síðani lógin kom í gildi hevur Markamótsnevndin tikið 13 avgerðir.

Í 2020 legði landsstýrismaðurin í almannamálum fram uppskot um broyting í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Endamálið við uppskotinum var at greiða nøkur av teimum ivamálum um ábyrgdarbýti, sum hava verið millum land og kommunur, eftir at ávísar tænastur blivu fluttar frá landinum til kommunurnar. Broytingin í lógini skuldi í størri mun tryggja, at borgarar frameftir ikki detta niðurímillum vegna ógreið viðurskifti millum land og kommunur.

Við galdandi áseting í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ásett, at kommunurnar veita fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið, búpláss á ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli. Og í serligum førum kunnu kommunurnar veita røktarkrevjandi borgarum, sum ikki eru fólkapensjónistar, búpláss á elli- og røktarheimi ella eldrasambýli.

Tað hava verið ivamál um, hvørjir borgarar, sum eru yngri enn 67 ár, eiga at fáa búpláss frá kommununum, og hevur Markamótsnevndin tikið fleiri avgerðir um, nær landið og nær kommunurnar skulu veita búpláss til borgarar undir 67 ár, sum eru røktarkrevjandi.

Avgerðirnar hjá Markamótsnevndini staðfesta, at røktarkrevjandi undir 67 ár, ið kunnu fáa búpláss eftir § 14, stk. 2 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., eru borgarar, ið hava sjúku, ið eldri fólk vanliga fáa, og sum er í menning og gongur afturá. Alzheimers og onnur sløg av demens eru mest vanligu sjúkur, ið elva til, at persónur gerst alsamt meira røktarkrevjandi. Sclerosa á seinna stigi er annað dømi.

Avgerðirnar vísa eisini, at borgarar undir 67 ár, sum hava seinheilaskaða, sum útgangsstøði eru ábyrgd hjá Almannaverkinum. Markamótsnevndin hevur eisini víst á, at borgarar, sum hava demens orsakað av rúsdrekkamisnýtslu, eiga at fáa bútilboð frá Almannaverkinum.

Við broytingin í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ætlanin, at, røktarheim og eldrasambýli hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki og varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið. Afturat hesum bleiv sett inn í § 14 at røktarheim og eldrasambýli hýsa persónum við varandi sjúku, ið er í menning og gongur afturá, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið. Hendan broyting staðfestir við lóg, hvør hevur ábyrgdina av at veita búpláss til tey, sum eru undir 67 ár og hava eina sjúku, sum er í menning og gongur afturá.

Ásetingin í § 14 er tó ikki komin í gildi enn, men hevur landsstýrismaðurin í almannamálum fingið heimild at seta ásetingina í gildi við kunngerð, eftir at eftirmetingin av lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m, lógini um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og fíggingarleistinum er liðug.

Tá ið lógin um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi 1. januar 2021 fekk Almannaverkið ábyrgdina av at veita búpláss sambært § 45 og § 46 til borgarar, sum bera fjølbrek, og borgarar, sum hava seinheilaskaða, sum eisini kunnu metast at vera røktarkrevjandi. Hetta er gjørt sambært avgerðunum hjá Markamótsnevndini.

Tá ið eftirmetingin er liðug, og landsstýrismaðurin hevur fingið hesa, verður støða tikin til, um ásetingin verður sett í gildi og um aðrar broytingar skulu gerast.

Tórshavn, 24. november 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður í almannamálum